# VB vann fyrstu kappinginga

**Hóast sumbingar stríddust manniliga, másttu teir lúta fyri grannunum úr Vági Tað gjørdust VB, sum vann fyrstu Lions-cup kappingina í Suðuroy**

LIONS-CUP

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hetta er ein kapping, sum Lions klubburin í Suðuroy skipar fyri ímillum tey fýra fótbóltsfeløgini í Suðuroy.

Innleiðandi dystirnir vóru í Hvalba fríggjakvøldið og har eydnaðist VB at spæla seg í finaluna við einum sannførandi 8-0 sigri á TB. Somuleiðis vunnu sumbingar sær finalupláss við einum teprum 4-3 sigri á Royn.

Finaludystirnir vóru í Vági leygardagin.

Dysturin um 3. plássið var sostatt ímillum TB og Royn og aftur hesuferð eydnaðist TB at vera omaná. Men aftur hesuferð var ógvuliga tepurt. TB vann 2-1, eftir javnleik 1-1 í hálvleikinum. Hallur Christiansen legði TB á odda í fyrra hálvleiki, men stutt eftir javnaði Birni Kjærbæk fyri Royn. Tað var ikki fyrrenn í allarsíðstu løtu, at tað eydnaðist sama Halli Christiansen at tryggja TB 3. plássið í kapppingini, tá ið hann skoraði til 2-1

Finalan ímillum VB og Sumba var ikki heilt so jøvn. VB hevði nógv tað mesta spælið, men sumbingar sýndu sannan stríðsvilja og tað var ikki fyrrenn í seinna hálvleiki, at VB fekk sett seg dystin og rættiliga slapp leyst av sumbingum.

Dysturin endaði 6-2 til VB eftir hálvleikstøðuna 3-2.

Fyri VB skutu Mindaugas og Símun Samuelsen hvør síni tvey mál og Jón Pauli Olsen og John Poulsen skutu hvør sítt. Málini hjá sumbingum skutu Norbert og Bergur Djurhuus.

Sostatt fingu vágbingar tað 80 sentimetra stóra ferðasteypið í varðveitslu í ár.

Í sambandi við tiltaki vóru eisini fleiri onnur tiltøk á skránni, eitt nú hoppiborgir, tombola og dansur. Umframt ítróttarligu avbjóðingina var endamálið við tiltakinum at savna pengar saman og allur peningurin, sum kom inn, verður latin til vælgerandi endamál í Suðuroy.



*VB-liðskiparin, Eyðun Jacobsen, hevjar steypið sum tekin um, at vágbingar eru fyrstu vinnararnir av Lions Cup*

*mynd: Áki Bertholdsen*



# 31 ross ríða kapp á ólavsøku

**Sum vant verður skipað fyri kappríðing á ólavsøku. Í ár fara 31 ross at kappast í fýra bólkum. Kappst verður í trav, tvíspor ung, tvíspor 2. flokkur og tvíspor 1 flokkur. Eins og undanfarin ár verður kappast á ríðibreytini í Marknagili, og kappingin byrjar Ólavsøkudag klokkan 14.**

tn

### Trav

| Nr. | Navn | Litur | Aldur | Reiðmaður | Eigari | Heimstaður | Tíð |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Maskot | Svartur | 14 ár | Andreas Davidsen | Andreas Pauli Davidsen | Miðvágur | |
| 2 | Nora | Gul | 12 ár | Andreas C. Lützen | Sjálvur | Tórshavn | |
| 3 | Kira | Svørt | 5 ár | Durita Egholm Hansen | Sjálv | Kollafjørður | |
| 4 | Rimnir | Leirljósur | 14 ár | Regin Johansen | Sjálvur | Tórshavn | |
| 5 | Stígandi | Hvítur | 17 ár | Heri Dahl | Kristian Debes | Tórshavn | |
| 6 | Tytur | Flekk. | 11 ár | Gunnar Grækarisson | Aksel Hansen | Tórshavn | |
| 7 | Drotning | Reyð | 10 ár | Knút Lützen | Sjálvur | Tórshavn | |
| 8 | Gletta | Grá | 9 ár | Marner Joensen | Jógvan Páll Egholm | Leynar | 55,9 |

### Tvíspor Ung

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9 | Grani | Gulur | 23 ár | Durita Reinert | Svenning Reinert | Norðradalur | 38,6 |
| 10 | Svanna | Flekkut | 16 ár | Jónas Poulsen | Hans Pauli Davidsen | Tórshavn | 37,3 |
| 11 | Søkin | Brúnur | 10 ár | Sanna Niclasen | Sjálv | Tórshavn | |
| 12 | Sisu | Reyð | 13 ár | Guðri S. Eysberg | Randi S. Wardum | Tórshavn | |
| 13 | Leikur | Gráur | 13 ár | Barbara Røsvik | Sólrun Andreasen | Tórshavn | 39,1 |
| 14 | Skenkur | Svartur | 11 ár | Sólrun Andreasen | Gunnar Grækarisson | Tórshavn | |
| 15 | Floymur | Gráur | 12 ár | Joan Hansen | Kalmar Lindenskov | Kollafjørður | |
| 16 | Huðin | Gráur | 13 ár | Hildur á Plógv | Gudmund Hansen | Tórshavn | 36,0 |
| 17 | Maskot | Svartur | 14 ár | Tummas Davidsen | Andreas Pauli Davidsen | Miðvágur | 36,8 |
| 18 | Faldur | Flekkutur | 19 ár | Joan Hansen | Kalmar Lindenskov | Kollafjørður | |
| 19 | Linsa | Brún | 16 ár | Andreas Pauli Davidsen | Jensia Davidsen | Miðvágur | |

### Tvíspor II Flokkur

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20 | Ørvur | Reyður | 10 ár | Poula Gregersen | Sjálv | Gøta | |
| 21 | Sitting Bull | Svartur | 15 ár | Svenning Reinert | Johan á Plógv | Tórshavn | |
| 22 | Brida | Gul | 14 ár | Sheila Petersen | Sjálv | Fuglafjørður | |
| 23 | Blesi | Reyður | 13 ár | Leif Sjúrður Petersen | Mortan Andreasen | Kvívík | 37,3 |
| 24 | Garpur | Gulur | 10 ár | Zacharias R. Jacobsen | Holgar Jacobsen | Sørvágur | 36,6 |
| 25 | Marengo | Brúnur | 11 ár | Øssur Andreasen | Petur Nolsøe | Tórshavn | 36,9 |

### Tvíspor I Flokkur

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26 | Ør | Brún | 9 ár | Beinta Jógvansdóttir | Sjálv | Saksun | |
| 27 | Aisa | Brún | 11 ár | Annfinn Reinert | Rólant Reinert | Tórshavn | 36,6 |
| 28 | Stjarni | Reyður | 6 ár | Ingi N. Rasmussen | Mariann á Válinum | Kvívík | |
| 29 | Kambur | Gulur | 11 ár | Heri Kristoffersen | Poul Falkvard | Sørvágur | 35,5 |
| 30 | Lokkur | Brúnur | 13 ár | Gunrid á Plógv | Rólant Reinert | Tórshavn | 34,4 |
| 31 | Nora | Gul | 12 ár | Dina Splidt | Andreas Lützen | Tórshavn | 35,9 |
| 32 | Sólvindur | Gul | 10 ár | Hans Pauli Poulsen | Sjálvur | Tórshavn | 34,1 |
| 33 | Fram | Gráur | 12 ár | Kristfríð D. Jacobsen | Júst Rubeksen | Tórshavn | 34,5 |



## Fuglafjarðar skúli

Hesi størv eru leys at søkja:

• **2 lærarastørv** fyri lærarar í farloyvi

**Starv 1:**
5 t fø. í 9. fl.
4 t ge. ítr. í 4. og 9. fl.
8 t heimk. í 8. og 10. fl.
2 t hand. í 9. fl.
2 t vakt í svimj.
+ starvspraktikk ella annað

**Starv 2:**
5 t fø í 9. fl.
6 t stødd. í 4. fl
2 t samtíð í 10. fl.
7 t serundirvísing

Starv 1 er tíðaravmarkað fyri skúlaárið 2004/2005, meðan starv 2 er tíðaravmarkað frá 1. august til 8. oktober 2004.

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um størvini frá skúlastjóranum á tlf. 448400 ella 214087.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 2. august kl. 10.00.**

**Leggið við ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum!**

**Fuglafjarðar skúlastýri**
**v/ Una Næs**
**FO-530 Fuglafjørður**

## Handilslærlingur

**Søkt verður eftir Handilslærlingi til VHS handilin á Hálsi, at byrja tann 16. august 2004**

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt spennandi starv til tann sum fær læruplássið, har viðkomandi sleppur at royna seg sum vørukeypari, gera tilboð og prýða um handilin. Viðkomandi fær eina breiða vitan um ventilatión, hitaanlegg og sanitet.

**Uppgávurnar fevna m.a. um:**
• Avgreiðlu av kundum
• Telefon avgreiðslu
• Røkt av handlinum
• Bílegging av vøru
• O.a. fyrifallandi arbeiði

**Førleikakrøv:**
At tann, sum søkir skal hava lokið FHS ella HH prógv

Send eina skrivliga umsókn til:

**P/F Maria Poulsen**
Smyrilsvegur 8
Postboks 182
110 Tórshavn

Meira fæst at vita við at ringja til Símin ella Áka á telefon 312000

**pf Maria Poulsen & Co.**
FO-100 Tórshavn • tel 312 000

*P/F Maria Poulsen, er størsta HVS virkið í Føroyum, við handli, verkstaði og búnýti. Í dag starvast 35 fólk hjá fyritøkuni*

Sosialurin 341800

## Talilærari - ráðgevi í Norðoyum

Eitt starv sum ráðgevi og talilærari hjá børnum undir skúlaaldur í Norðoyum er leyst at søkja.

**Tíðarskeið :**
Frá 1. september 2004 (ella skjótast til ber) til 30. juni 2005.

**Førleikakrav:**
Lærari ella pedagogur við serlæraraútbúgving.

**Tímatal:**
14 tímar um vikuna. ( Arbeiðið verður skipað í samráð við tali- hoyriráðgevan í SD.

**Løn:**
Eftir sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærara felag ella Føroya Pedagogfelag.

Fyrimun hevur umsøkjari, ið hevur royndir við børnum við autismu.

Meira fæst at vita við at venda sær til Egon Hansen, tali- hoyriráðgeva, tlf. 315383/ 215383 ella Hans Eli Dahl, stjóra, tlf. 314919/ 225803.

Sendið umsókn við avriti av próvskjølum og møg. viðmælum til Sernámsdepilin skjótast til ber, í seinasta lagi 18. august 2004.

**Sernámsdepili**
Frælsið 32
Tlf. 314522 - Fax 310196
Postrúm 2036, FO 165 Argir

## DREAMBOX



**Besti fylgisveinamóttakarin á marknaðinum.**

**Kann eisini brúkast sum spælimaskina ella jukebox, og kann setast til internetið.**

Fyri einans
**3.995,-**




W W W . S K Y . F O




## Arkitektur og Byggifrøðingur

Søkt verður eftir einum arkitekti og einum byggifrøðingi.

Arbeiðsuppgávurnar umfata um- og nýbyggingar, har Teknistovan veitir ráðgeving fyri almennar og privatar byggiharrar, alt frá programskrivum, skitsu- og høvuðsprojekteringum til eftirlit og avhendan av bygningum og økjum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal í minsta lagi hava 5 ára praktiskar royndir frá líknandi arbeiði, skal hava góð samstarvsevnir og duga at arbeiða sjálvstøðugt.

**Setunarviðurskiftir**
Løn og setanartreytir verða eftir nærri avtalu.

Umsókn við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum skula vera inni áðrenn 20. august 04.

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði, og skula sendast til.

**TEKNISTOVAN**
v/ Eyðun Petersen arkitektur
Torvgøta 1 600 Saltangará
Tlf 44 80 05 Far 21 93 94 Fax 44 80 50